# Ársfundur í Landsneti

**Fríggjadagin 14. februar 2014, kl. 12.00 - 15.45**
**Byrjað verður við ábiti á Koks – Fundurin verður í Veitsluhøllini á Hotel Føroyum.**

### Kl. 11.45: Døgurði á Koks

### Kl. 12.55: Vælkomin

*Hilmar Høgenni, nevndarformaður*
Formaðurin í nevndini fyri Landsnet og leiðslan í KT Landsins hava gjørt skránna og hava heitt á Frankie Jensen um at vera orðstýrar og Maju Josenius Whale um at vera skrivara.

### Kl. 13.00: Formansins frágreiðing

Hilmar greiðir frá málum, sum nevndin hevur arbeitt við í 2013 og kunngjørt verður hvussu nevndin er mannað í 2014.

***Tutl**: 3 minuttir prát við borðini um framløguna. Skriva á gular seðlar, sum vit savna saman.*

---

### Kl. 13.20: Ráðstevna – partur 1

*Johan Martin Jacobsen, Grannskoðaravirkið Januar*
KTL veður grannskoða árliga, SLA verður gjørt millum KTL og Elektron og millum KTL og kundarnar. Elektron hevur bundið seg til eina árliga grannskoðanaraváttan, og endamálið við henni er, at grannskoðarar hjá kundunum hjá KTL hava eina árliga váttan av, hvat eftirlit er framt í KTL og hvat ikki er framt.

### 13.40: Aktuelle udfordringer og trends

*Michael Ørnø, stjóri á Statens IT*
Greiðir frá teirra royndum og síni fatan av nøkrum av okkara avbjóðingum. Evnini eru: 1. Strategisk analyse af Statens IT, 2 Fortsat effektivisering og harmonisering gennem – "As a service ..." og 3 IT sikkerhed – en dagsorden der vokser eksponentielt globalt.

*Tutl 3 min.*

---

---

### 14.00: Status og ætlan, KT Landsins

*Nicolai Balle, rakstrarleiðari, KTL*
Greitt verður frá 1. Uppfylging 2013, m.a. málum og avrikum, 2. Rakstrarstøðuni, m.a. tráðleysum netum, seint at starta teldur og avgreiðing av bíleggingum og 3. Fokus øki 2014. Har dentur verður lagdur á at betra um rakstur og menning.

### 14.10: KT-trygd

*Leif Abrahamsen, Stjóri á Gjaldstovuni*
Landsnet fer at gera ein trygdarstandardpakka til vanliga stovnar. Hetta er ein uppgáva, ið krevur servitan, og í staðin fyri at hvør stovnur í sínum lagi hevur ábyrgdina av egnari KT-trygd.

.

*Tutl 3 min*

---

### Kl. 14.30: Spurningar frá Hagstovuni

*Nicolai Balle, rakstrarleiðari, KTL*
Hagstovan hevur sent 3 spurningar inn til ársfundin: 1. Hvussu er prísmyndilin hjá Landsneti samansettur, 2. Hvat verða pengarnir Landsnet fær inn brúktir til, 3. Trygd á netinum og 4. Vandin við at knýta seg til ein veitara..

---

**14.30 ------------ S T E Ð G U R ---------------------**

### Kl. 14.45: Benchmark

*Atli Leo, Fíggjarmálaráðið*
Hví hava vit ynskt ein benchmarkkanning?

### 15.20: Benchmarking af KT Landsins

*Kasper Poulsen, Zangenberg Analytics*
Prísirnir og tænasturnar, ið KT Landsins veitir verður benchmarkaður mótvegis marknaðarprísinum. Hugt verður eftir avtalum og teimum vørum og tænastum, ið eru veittar sambært KT Landsins.

### 15.30: Viðgerð og kjak

***Um Landsnet:** Landsnet er miðsavnað KT-tænasta, ætlað øllum almennum stovnum. Endamálið við Landsneti er at virka fyri einari effektivari og tryggari KT-nýtslu í almennu fyrisitingini. Við at gerast partur av Landsneti, fær stovnurin útveitt allan sín KT-infrastruktur, og skal ikki sjálvur taka sær av hýsing, backup, trygd á servarum og teldum, netsambandi (kaðal og tráðleyst), support, keyp og uppseting av teldum og servarum og keyp av standard-lisensum. Á Landsneti verður stovnurin partur av **einum** miðsavnaðum tøkniligum palli, sum ger samstarv tvørtur um stovnsmørk munandi lættari. Landsnet verður framhaldandi ment, og stovnurin fær tískil eisini tilboð um atgongd til nýggjar tænastur.*